**Bill Justinussen**
**løgtingsmaður**

**Broytingaruppskot**

**til**

**2. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 17/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. Í § 7, stk. 3 verður "av øli" broytt til: "sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi".

2. Í § 8, stk. 1 verður "av øli, sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi" broytt til: ", sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi".

3. Í § 8, stk. 2 verður "øli" broytt til: "egnari framleiðslu, sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi".

4. Í § 8, stk. 3, 2. pkt. verður "øli" broytt til: "egnari framleiðslu, sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi".

**Viðmerkingar**
Við uppskotinum verður atgongdin at fáa hendur á rúsdrekka betrað. Miðflokkurin tekur ikki undir við at betra atgongdina til rúsdrekka. Orsøkin er, at betrað atgongd økir um rúsdrekkanýtsluna. Og økt rúsdrekkanýtsla hevur við sær, at

- fleiri gerast misnýtarar av rúsdrekka, sum aftur hevur við sær negativar sosialar avleiðingar ikki einans fyri misnýtaran, men fyri familjuna. Og har børn eru partur av rúsdrekkamisnýtslu, kunnu avleiðingarnar hava við sær lívslangar skaðar
- fleiri heilsuvandar og generelt versnandi fólkaheilsa
- lægri miðal-livialdur
- samfelagsligar avleiðingar so sum størri sjúkrafrávera
- fleiri pengar skulu setast av til fleiri rúsviðgerðartilboð
- fleiri ferðsluóhapp og –skaðar

Sambært nýggjastu frágreiðing frá OECD, er miðallivialdurin í Danmark tann lægsti í Vestureuropu sambært hjálagda tíðindagrein í Dagur.fo
https://portal.fo/dagur-11274/danmark-hevur-laegsta-midallivialdurin-i-vesturevropa.grein

Tað er greitt samband millum lægri livialdur og rúsdrekkanýtslu. Vit eiga ikki sum almennur myndugleiki at seta lógir í verk, sum gera seg inn á fólkaheilsuna og harvið lækka livialdurin. Hetta er ímóti øllum vísindaligum tilmælum og til ógagns fyri unga ættarliðið. Vit eiga at geva okkara børnum og ungu eitt samfelag, har atgongdin til at rúsa seg er avmarkað, júst fyri at geva teimum eina betri framtíð. At geva ungum eitt gott samfelag er ein meginregla í øllum ítrótti, innan skótavirksemi, innan samkomuvirksemi og innan alt ungdómsvirksemi. Tí vildi tað verið at farið í stríð við allan ungdómspolitikk at betrað atgongdina til rúsdrekka.

Fólkaheilsuráðið vísir á, at tess betri atgongd er til rúsdrekka, tess meiri verður selt og hareftir meiri drukkið. Fólkaheilsuráðið mælir tí til varnan politikk á hesum øki, har eitt avgerandi amboð er søla samlað í einkarsølu. Fólkaheilsuráðið vil heldur styrkja einkarsøluna og framtíðar tryggja hana og heldur, at einkarsølu meginreglan skal varðveitast.
Sum er, er tað nøktandi við teimum støðum, har Rúsdrekkasøla landsins longu er. Eingin hevur longri enn ein hálvan tíma til nærmasta sølustað. Danmark er einasta Norðurland, har rúsdrekkasølan er frí.

**Á Løgtingi, 10. desember 2018**

Bill Justinussen